HEILSUMÁLARÁÐIÐ

17. august 2022
Mál: 22/06667-33
Viðgjørt: Guðrun Maria Mortensen

**Tilmæli**
**til**
**landsstýrismannin**

**Um val av nýggjum limum til Etiska ráðið**

**Málslýsing**

Løgtingslóg um Etiskt ráð fekk gildi tann 1. september 2017, og tann 1. januar 2018 fór Etiska ráðið formliga til verka.

Etiska ráðið verður mannað við níggju ráðslimum, ið verða settir fyri fýra ár í senn. Sitandi ráðslimir hava nú sitið í 4 ár, og skulu nýggir ráðslimir sostatt tilnevnast. Sambært lógini setur landsstýrismaðurin í heilsumálum ráðið eftir hesum reglum:

- Landsstýrismaðurin í heilsumálum tilnevnir formannin í ráðnum, umframt ein lim
- Landsstýrismaðurin í heilsumálum tilnevnir ein lim eftir tilmæli frá landsstýrismanninum í almannamálum, ein lim eftir tilmæli frá Kommunufelagnum, ein lim eftir tilmæli frá landsstýrismanninum í vinnumálum, ein lim eftir tilmæli frá landsstýrismanninum í kirkjumálum og tríggir limir eftir tilmæli frá politisku flokkunum, ið hava umboð á Løgtingi.

Sambært § 6, stk. 3 í løgtingslógini um Etiskt ráð, skulu teir tilnevndu limirnir hava innlit í etisk, mentanarlig, samfelagslig og faklig viðurskifti, ið hava týdning fyri ráðsins virki. Harumframt skal landsstýrismaðurin í heilsumálum tryggja, at ráðið verður samansett við fólki við fjølbroyttum útbúgvingum og royndum og at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðað, sí § 6, stk. 5. Tá ið ráðið verður sett av nýggjum, verður miðað ímóti, at

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn • Tel: +298 304050 • hmr@hmr.fo

í minsta lagi 3 limir frá undanfarna valskeiði verða sitandi eitt valskeið afturat. Limir kunnu verða settir av nýggjum eina ferð, sí § 6, stk. 6.

Heilsumálaráðið heitti í vár á viðkomandi partar um at koma við tilmæli um val av nýggjum limi til Etiska ráðið, og eru hesir persónar í uppskoti:

**Landsstýrismaðurin í almannamálum hevur tilmælt**
*Súsonnu Nordendal*, løgfrøðing
*Leif Olsen*, sosialráðgeva

**Kommunufelagið hevur tilmælt**
*Jóngerð Guttesen*, leiðara í Roðanum
*Niels A. Joensen*, leiðara í Veks

**Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur tilmælt**
*Noomi Gregersen*, verkætlanarleiðara í Fargen
*Janus Wang*, stjóra í Inova

**Landsstýrismaðurin í kirkjumálum hevur tilmælt**
*Marjuna Lómaklett*, sóknarprest og virkandi integratiónsprest
*Berg Debes Joensen*, sóknarprest í Vesturkirkjuni

**Politisku flokkarnir, ið hava umboð á Løgtingið hava tilmælt**
Fólkaflokkurin: *Richard Schwartsson, farmaceut, Brynhild Setberg, váðaráðgeva hjá Tórshavnar kommunu, Arna Zachariassen, rúsviðgera á Blákrossheiminum*
Miðflokkurin: *Aksel Kambsskarð Berg, lækna á Landssjúkrahúsinum, Jóannes Purkhús, sóknarprest á Viðareið, Símun Absalonsen, grannskoðara*
Sambandflokkurin: *Berg Debes Joensen, sóknarprest í Vesturkirkjuni, Jensiu Højgaard Kjærbæk, sjúkrarøktarfrøðing*
Tjóðveldisflokkurin: *Súsonnu Mortensen, sjúkrarøktarfrøðing, Bergtór Hjelm Bjarkhamar, sóknarprest í Hoyvíkar kirkju*
Framsókn: *Dorit Hansen, lærara á miðnámi á Kamsdali, Hákun Andreasen, savnsteknikara á Fornminnissavninum*
Javnaðarflokkurin: *Jógvan D. Hansen, heimspeking, Marina Strøm, lektara í heilsuvísindum*

Sjálvstýri: Sjálvstýri hevði onki tilmæli um val av limi til Etiska ráðið

**Sitandi limir í Etiska ráðnum eru:**

*Anne Mette Greve Klementsen*, sóknarprestur, forkvinna, og *Ann Danielsen, serlækni í kvinnusjúkum* (sambært tilmæli frá landsstýrismanninum í heilsumálum)

*Leif Olsen, sosialráðgevi* (sambært tilmæli frá landsstýrismanninum í almannamálum)

*Jákup H. Foldbo*, samfelagsfrøðingur (sambært tilmæli frá Kommunufelagnum)

*Debes H. Christiansen, lívfrøðingur* (sambært tilmæli frá landsstýrismanninum í uttanríkis- og vinnumálum)

*Marjun Bæk, gudfrøðingur* (sambært tilmæli frá landsstýrismanninum í kirkjumálum)

*Jógvan D. Hansen, heimsspekingur, Richard Schwartsson, farmaceutur* og *Sólbjørg Fredriksberg*, fysioterapeutur (sambært tilmæli frá politisku flokkunum, ið hava umboð á Løgtingið)

**Tilmæli**

Mælt verður landsstýrismanninum til at seta Etiska ráðið av nýggjum har tað samstundis í samsvar við § 6, stk. 6 í lógini verður *"...miðað ímóti, at í minsta lagi 3 limir frá undanfarna valskeiði verða sitandi eitt valskeið afturat"*.